# Ársfrágreiðing 2009



Mynd: COME

Uttanríkisráðið

Altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp

Formæli....3

Menningarsamstarvspolitikkur....4
Sameindu Tjóðir um menningarsamstarv....5
Hvar fer menningarhjálpin ?....6

Menningarsamstarv lond....7
Burundi....7
Indonesia....8
Kambodia....10
Kenja....11
Liberia....12
Sierra Leone....13
Senegal....14
Tansania....16
Annað....18

Neyðhjálp lond....19
Filippsoyggjar....19
Samoa....19

Virksemi nevndarinnar....21

Samstarvspartar....22
ABC-barnahjálp í Føroyum....22
ADRA (Adventist Development and Relief Agency)....22
Care for Rural Deprived Children (CRUDEC)....22
Christian on Mission Extension (COME)....22
Mercy Corps....22
Mkuza Youth Development Association (MYODA)....22
Reyði Krossur....22
Vestkenyas Venner....23
World Food Programme....23

Listi yvir menningarlond....24

Fíggjarnýtsla....25

Contributions to WFP in 2009 (in US$) as of 17 January 2010....26

Lóg um altjóða menningarsamstarv....28

# Formæli

Í 2009 lótu Føroyar menningarhjálp til seks lond í Afrika og tvey í Asia. Stuðulin er í høvuðsheitum latin verkætlanum, sum snúgva seg um heilsu og útbúgving.

Í 2010 er ætlanin, at Føroyar harumframt skulu bjóða seg fram sum ráðgevarar innan fiskivinnumenning. Altjóða hjálparfelagsskapur, ið hevur fingið fígging frá Europeiska Samveldinum til at menna fiskivinnuna í menningarlondum, hevur vent sær higar at fáa stuðul og vitan.

Í altjóða menningarsamstarvi taka Føroyar ábyrgd sum land, og luttaka í felags átøkum at betra um búskaparójavnan í heiminum. Hóast vit í krónum og oyrum ikki hava so nógv at geva burturav, liggur okkara partur – almenni og privati – ikki eftir.

Við sannføringini um, at **fyri heimin ert tú bara onkur, men fyri onkran ert tú allur heimurin**, er Uttanríkisráðið til reiðar at taka upp samstarv á einum grundarlagi, sum kann føra til betri livikor hjá einstøkum íbúgvum í menningarlondum.

Í Tinganesi apríl 2010

Jørgen Niclasen

uttanríkisráðharri

## Menningarsamstarvspolitikkur

Føroyar hava seinastu árini fingið ein alt virknari uttanríkispolitikk, sum er eyðkendur av fleiri og fleiri virkisøkjum. Innan altjóða menningarsamstarv eru Føroyar virknar og taka tøk í felagsarbeiðinum til at betra um búskaparójavnan í heiminum.

Høvuðsendamálið við altjóða menningarsamstarvi er at virka fyri at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum gjøgnum burðardygt menningarsamstarv.

Umframt at virka fyri hesum máli hevur landsstýrið sett sær fyri at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum.

Hóast vit í krónum og oyrum ikki hava so nógv at geva burtur av, liggur okkara partur – bæði almenni og privati – ikki eftir.

Tá ið tað kemur til øki at samstarva um og stuðla, verða útbúgving og heilsa raðfest. Hetta er grundað á, at útgangsstøðið fyri menningarsamstarvinum er sjálvberandi menning, og tá er útbúgving grundarlagið. Góð heilsa er ein treyt fyri at kunna læra, tí hanga útbúgving og heilsa óloysiliga saman.

Harumframt verður stuðul eisini latin øðrum geirum, sum byggja á grundarsteinarnar hjá Sameindu Tjóðum.

Men ikki minst er umráðandi, at vit velja at stuðla teimum verkætlanum, sum Føroyar og føroyingar eisini kunnu fáa nakað burturúr. Tað veri seg innan førleikamenning, vinnu ella annað samstarv.

Menningarsamstarvið verður í høvuðsheitum framt saman við sjálvbodnum hjálpar-felagsskapum, sokallaðu Non Governmental Organisations (NGO), men mett verður, at tað eisini er umráðandi at samstarva við stjórnarfelagsskapir. Higartil hevur verið samstarvað við WFP, hvørs endamál er at basa hungri, at menna føðsluvirðið hjá teimum, ið hungra/svølta og at stuðla undir sjálvberandi menning, har mattrot og hungur er.

Mett verður, at játtanin er alt ov lítil til tvípartasamstarv. Í tvíparta menningarsamstarvi er mannagongdin vanliga hon, at gevaralandið setur móttakaralandinum krøv innan lóggávu og vinnu. Lutfallið í tílíkum samstarvi vildi í løtuni á ongan hátt verið proportionalt.

Komandi árini verður tí framvegis samstarvað við felagsskapir, bæði stjórnarligar og sjálvbodnar, og serligur dentur fer at verða lagdur á føroyska luttøku í verkætlanum. Eisini er ætlanin at fylgja verkætlanum yvir nøkur ár, soleiðis at tað m.a. verður léttari at gera eftirmetingar og meta um nyttuna.

***Sameindu Tjóðir um menningarsamstarv***

ST mælir ídnaðarlondum til at gjalda 0.7% av bruttotjóðarinntøku (BTI) síni til altjóða menningarsamstarv. Í royndum lata hesi lond um 0.47% í miðal. ST hevur síðani samtykt, at í 2015 skulu ríku londini halda síni lyfti, og ávegis er sett sum mál, at í 2009 eiga londini at lata 0,5% av BTI til hetta arbeiðið.

Henda samtyktin hjá ST er einans galdandi fyri sjálvstøðug lond og fevnir tískil ikki um Føroyar. Hóast altjóða samfelagið einki væntar av okkum, tykist politisk semja vera um, at Føroyar eiga at seta sær sum mál at lata meiri av BTI til hetta arbeiðið. Í 2009 lótu vit 3 mió. kr. til menningarsamstarv, sum svaraði til um 0.03% av okkara BTI. Tað fara við vissu at ganga nógv ár, áðrenn vit røkka málinum um at lata 0.7% av BTI, sum við 2010-tølum vildi verið um 80.5 mió. kr., tó eigur tað ikki at forða okkum at seta sum mál, at økja árligu upphæddina við til dømis 0.02%.

Í ár 2000 blivu limalondini undir ST samd um eina felags fráboðan um tey mál, sum skulu stingast út í kortið fyri at basa fátækradøminum í menningarlondunum. Limalondini hava bundið seg til at arbeiða samsvarandi hesum málum, sum vanliga verða nevnd 2015Málini.

Málini eru:

- At basa fátækradømi og hungri
- At fremja grundskúla fyri øll
- At fremja javnrættindi millum kynini og styrkja kvinnurnar
- At minka um barnadeyða
- At betra um heilsuna hjá møðrum
- At basa HIV/AIDS, malaria og øðrum sjúkum
- At tryggja burðardygt umhvørvi
- At menna altjóða samarbeiði um menningarsamstarv

Á hvørjum ári metir ST um, í hvønn mun arbeitt verður við omanfyrinevndu málum. Í seinastu frágreiðingini[1], sum er frá 2009, verður millum annað sagt, at ábøtur eru at síggja innan fleiri øki. Sum dømi verður nevnt, at færri doyggja av malaria og AIDS, og at alt fleiri fólk í menningarlondum nú hava atgongd til vatn. Harumframt verður eisini nevnt, at talið av børnum, sum ganga í skúla, er munandi økt. Men steðgur og afturgongd eru eisini at síggja á fleiri økjum. Hetta kemst av fíggjarkreppuni, sum av álvara rakti heimin í 2008. Hetta sæst aftur í størri arbeiðsloysi og øktum matvøruprísum. Og hetta setir síni spor, tí fleiri gevaralond hava minkað um stuðulin frá tí almenna. Sagt verður í frágreiðingini, at tað eru einans Norra, Svøríki, Danmark, Holland og Luksemburg, sum liva upp til málið um at lata 0.7% av BTI til altjóða menningarsamstarv.

Uttanríkisráðið fylgir gongdini hjá Sameindu Tjóðum (ST) innan altjóða menningar-samstarv, og hóast Føroyar á ongan hátt hava verið við í fyrireikandi arbeiðinum at leggja til rættis altjóða menningarsamstarv, so hava vit valt at taka málini til okkum og at virka samsvarandi tilráðingunum.

[1] The Millenium Development Goals Report 2009, United Nations

***Hvar fer menningarhjálpin ?***

Í 2009 var menningarhjálp latin átta londum, har tey flestu eru í Afrika. Tey eru: Liberia, Gana [2], Burundi, Kenja, Sierra Leone, Tansania og Senegal. Harumframt var menningarhjálp latin Kambodia og Indonesia, sum liggja í Asia.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu játtanin er býtt millum londini.




Í partinum, sum lýsir londini, verður greitt frá, hvussu stuðulin er nýttur.

Meginparturin av stuðlinum er veittur gjøgnum NGO' arar, tó eru 400.000 kr. latnar stjórnarfelagsskapinum WFP til verkætlanina Senegal Country Programme.

Fyrisitingarliga er menningarstuðulin skipaður soleiðis, at allir móttakarar undirritað avtalu, har ásett er, nær verkætlanin verður framd. Síðani fær Uttanríkisráðið frágreiðing um gongdina í verkætlanini og upplýsingar um, nær Uttanríkisráðið fær roknskap samsvarandi umsóknini hjá felagsskapinum.

Tað eru alt fleiri felagsskapir, sum venda sær til Uttanríkisráðið við umsóknum til ymiskar verkætlanir, men tá upphæddin er avmarkað, er ikki møguligt at ganga øllum umsóknum á møti.

[2] Stuðul latin í sambandi við stuðulskonsert

# Menningarsamstarv lond

Búskaparfelagsskapurin undir ST, OECD, bólkar menningarlond í fýra flokkar. Flokkingin er gjørdur eftir BTI pr. íbúgva:

| Fátækastu lond | Onnur fátøk lond | Undir miðal | Yvir miðal |
|---|---|---|---|
| - | BTI $ upp til 935 | BTI $ 936 -3.705 | BTI $ 3.706-11.455 |

OECD dagførir javnan hetta yvirlit, sum er galdandi fyri 2008, 2009 og 2010. Bólkurin Fátækastu londini verða í yvirlitinum hjá OECD róptur Sera Skuldarbundin Lond (Heavily Indebted Countries).

Á kortinum niðanfyri eru londini, sum hava móttikið stuðul úr Føroyum, frámerkt.




## Burundi

649.900 kr. eru latnar til at byggja skúla í Bururi-økinum í Burundi. Peningurin er latin gjøgnum felagsskapin ADRA, sum stendur fyri byggingini.

Undir krígnum, sum herjaði í 90'unum, vóru um 40 % av skúlunum í økinum oyðilagdir. Danska Uttanríkisráðið hevur upplýst, at enn eru einans 15% av skúlunum bygdir uppaftur. Tørvurin er sostatt stórur, og stjórnin hevur gjørt av, at skúlagongd skal vera ókeypis.

Stuðulin fer til at byggja skúla, sum hevur seks skúlastovur, umsitingarbygning og ein latrinubygning. Harumframt verður ein stórur vatnbrunnur gjørdur. Børnini, sum skulu

ganga í skúlanum, vera í aldrinum 7 – 15 ár. Roknað verður við, at 500-600 børn kunnu fáa gagn av bygginginі.

Undirvíst verður í støddfrøði, samfelagsfrøði, kirundi, swahili, fronskum og enskum. Fyri at fáa føroyska luttøku í verkætlanina, er avtala gjørd við ADRA og við Føroya Læraraskúla, soleiðis at læraraskúlanæmingar í Føroyum kunnu fara í praktikk á skúlanum , og lærarar kunnu undirvísa í stytri tíðarskeið í Burundi.

Byggingin byrjar í februar 2010, og skúlin skal verða liðugur tríggjar mánaðir seinni. Verkfrøðingur verður settur at fylgja ætlanini, sum verður framd samsvarandi reglunum hjá ADRA. Uttanríkisráðið fær frágreiðing tríggir mánaðir eftir, at verkætlanin er farin av bakkastokki og grannskoðaðan roknskap og frágreiðing í august 2010.

Í Burundi búgva góðar 6 milliónir fólk og miðal livialdurin er 45 ár. Burundi verður flokkað saman við fátækastu londunum í flokkingini hjá OECD.



Mynd: ADRA

Skúlin, sum verður bygdur, hevur sama byggisnið, sum á myndini omanfyri.

**Indonesia**

Í 2008 stuðlaði Uttanríkisráðið Mercy Corps við 627.180 krónum til at seta í verk ætlanina at byggja upp eitt fyrimyndarumhvørvi viðvíkjandi bróstageving. Endamálið var at seta í verk áheitanina hjá Unitet Nation International Children´s Emergency Fund (UNICEF) og World Health Organisation (WHO) frá 1991, sum verður rópt "Ten steps to Successful Breastfeading".

Avgjørt er at halda fram við hesi verkætlan og at játta 540.000 kr. til at seta á stovn eina klinikk á Kojo sjúkrahúsinum í norður Jakarta. Sjúkrahúsið hevur heitt á Mercy Corps um at stuðla við íverksetanini av klinikkini, við serligum denti á marknaðarføring og fyriskipan við endamálinum um at byggja upp fyrimyndarumhvørvi, har læknar, jarðarmøður og onnur heilsustarvsfólk kunnu fáa og geva frálæru. Sagt verður í umsóknini, at klinikkin verður bygd upp eftir sama mynstri, sum Gigni. Ætlanin er, at klinikkin skal vera sjálvberandi fíggjarliga.

Klinikkin skal virka fyri, at barnadeyðin minkar, at undirføðslan av smábørnum minkar, og at mammur geva bróstamjólk í longri tíð. Ætlanin er býtt í fimm stig.1) Fyrireiking, 2) Fíggjarætlan og setan av fíggjarfrøðingi, 3) Introduktión og kunning, 4) Íverksetan, fyrsta

stig, har serligur stuðul verður latin, bæði fíggjarliga og fakliga, at fáa verkætlanina í gongd og 5) Eftirmeting og møgulig tillaging. Ætlanin byrjar í januar 2010 og endar í mars 2011.

**Góðkenning við føroyskari undirskrift**

Mercy Corps hevur staðið fyri undirvísing av leiðreglunum hjá UNICEF og WHO viðvíkjandi bróstageving. Tað vóru 65 føðistøð, sum meldaðu seg til hesa undirvísing. Teir 65 luttakararnir vóru býttir í seks ymiskar bólkar, tvs. almenn sjúkrahús, privat sjúkrahús, føðiklinikk osfr. Tá ein tíð var farin, gjørdi Mercy Corps eftirmeting, har funnið varð fram til, hvør hevði klárað seg best at seta í verk nýggju mannagongdirnar.

Tey, sum fingu hægstu próvtølini, vunnu møguleikan at koma til Føroyar á námsferð. Námferðin var í oktober, og við í ferðalagnum vóru læknar, ljósmøður, sjúkrasystrar, heilsustarvsfólk og umsitingarfólk frá MercyCorps og umboð frá kommunalu myndugleikunum í norður Jakarta, íalt 14 fólk.  Endamálið við námsferðini var at fáa kunnleika og vitan um at seta í verk heilsupolitikk á smábarnaøkinum.

Ljósmøður og heilsusystrar vóru við til at leggja skránna til rættis. Talan var um tveir undirvísingardagar, sum vóru skipaðir við ástøðiligari frálæring og við vitjanum. Fyrra dagin stóð Gigni fyri, har luttakararnir, umframt ástøðiliga frálæru, fingu høvi at vitja privat heim, saman við heilsusystrum, heilsuskrivstovuna í Kommunuskúlanum og mammubólkarnir, sum halda til í Kristnastovu.

Seinna degnum stóðu ljósmøðurnar fyri. Fyrst var skipað fyri ástøðiligari frálæru, síðan var høvið at fylgja undirvísing í føðifyrireiking og harumframt vitjaði ferðaliðið eisini viðkomandi deildir á Landssjúkrahúsinum. Eisini varð vitjað á føðideildini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Á samkomu á Hotel Hafnia, handaði Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, vinnandi luttakarunum prógv fyri at hava gjøgnumført undirvísingina við góðum úrsliti. Prógvini hava Jørgen Niclassen, uttanríkisráðharri, H. Bambang Sukiyono, borgarstjóri í Norður Jakarta, og Sean Granville-Ross, ovasta fyri Mercy Corps í Indonesia, undirritað. Allir 65 luttakararnir hava fingið tílík prógv.

Á myndini niðanfyri er Jørgen Nicalasen, uttanríkisráðharri, avmyndaður saman við vinnandi luttakarunum.



Mynd: Mercy Corps

Verkætlanin er liður í at fáa føroyingar at gerast altjóða ráðgevar innan heilsupolitikk. Endamálið er eisini at knýta bond millum londini.

Í Indonesia búgva umleið 230 milliónir fólk og mett verður, at umleið 8.5 milliónir fólk búgva í Jakarta. Á listanum hjá OECD yvir menningarlond er Indonesia skrásett í bólki tvey, har bólkur fýra eru tey fátækastu.

**Kambodia**

Reyði Krossur í Føroyum hevur fingið 517.500 kr. til heilsuverkætlan í Rattanakiri landslutinum í Kambodia. Verkætlanin verður framd saman við Danska Reyða Krossi í Kambodia og Reyða Krossi í Kambodia. Sum partur av verkætlanini, søkti Reyði Krossur í Føroyum eftir fólki, ella delegati, at arbeiða í økinum í tveir mánaðir. Annika Hoydal, ljósmóður, fekk uppgávuna, sum Reyði Krossur fíggjaði.



Mynd: Reyði Krossur

Endamálið við verkætlanini er at betra um heilsustøðuna hjá fátækrafólki í Rattanakiri økinum í Kambodia. Talan er um arbeiði í sjey bygdum, har áleið 3.700 fólk búgva. Barnadeyðin í økinum er sera høgur, og undirføðsla er ein stórur trupulleiki. Verkætlanin er býtt í hesi mál: 1) Betra um heilsustøðuna hjá smábarnamøðrum, 2) Betra um vitanina um móðurmjólk, 3) Betra um vitanina viðvíkjandi fyribyrging og viðgerð av hættisligum sjúkum, sum eru vanligar í økinum, 4) Betra um vitanina viðvíkjandi persónligum reinføri o.l. 5) styrkja um heilsuundirvísingina í skúlunum, 6) seta á stovn samstarv ella netverk millum sjálvboðin fólk, sum starvast hjá Reyða Krossi, í øllum sjey bygdunum, 7) betra og styrkja um fakliga førleikan hjá Reyða Krossi í Cambodia at standa fyri og traðka til í sambandi við heilsuverkætlanir.

Undirvísingin er serliga ætlað kvinnum, sum eru við barn, smábarnafamiljum og børnum annars, sum eru undir fimm ár. Í umsóknini var m.a. upplýst, at Føroyar senda út fólk at styrkja um fakteknisku førleikarnar viðvíkjandi heilsu, reinføri og saniteti.

Uttanríkisráðið hevur móttikið frágreiðing um gongdina í verkætlanini higartil og fær grannskoðaðan roknskap tríggjar mánaðir aftaná, at verkætlanin er liðug. Sum tað er ásett í lógartekstinum fyri menningarsamstarv, leggur Uttanríkisráðið áherðslu á at tryggja føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum sum heild.

Í Kambodia búgva umleið 14.2 milliónir fólk og í yvirlitinum hjá OECD verður landið flokkað í fátækasta bólkin.

**Kenja**

Uttanríkisráðið hevur eisini stuðlað VestKenyas Venner við 31.150 kr. Peningurin er nýttur til at basa útbreiðslu av HIV og AIDS.

Verkætlanin er framd í vestur Kenja, í Kisembo økinum og har um leiðir. Átta bygdir hava luttikið við tilsamans 448 skúlaungdómum. Verkætlanin snýr seg um at skipa fótbóltsskúla og undirhald. Hetta verður samskipað við undirvísing og ráðgeving um HIV og AIDS, samstundis sum tað stendur luttakarunum í boði at kanna seg fyri HIV-smittuna.

HIV/AIDS er ein stórur trupulleiki í vestur Kenja. Arbeitt verður við evnum, sum vanliga ikki verður tosað um. Áðrenn fyrsta fótbóltsskúlan, sum var í 2007 í Kisumbaøkinum, varð ikki tosað um AIDS, og um hvussu sjúkan smittar. Úrslitini frá 2007 vísa, at arbeiðshátturin hjá umsøkjarunum er gagnligur.

Peningurin verður nýttur til mat til børnini, ferðing til Kenja og ferðing í landinum, fótbóltar, undirvísingaramboð o.a.




Mynd: Oluf Mortensen

Tað er sjálvbodni hjálparfelagsskapurin VestKenyas Venner, ið stendur fyri verkætlanini, og hon verður framd saman við umboðum frá Ribe fodboldklub og DBU. Føroyingurin Oluf Mortensen er ein av fótbóltsvenjarunum, sum vegna felagsskapin hevur sent ráðnum umsóknina.

Í sama øki, sum fótbóltsskúlin helt til, býr omma amerikanska forsetan, Barak Obama. Oluf Mortensen nýttið høvið at vitja hana, og fekk samstundis høvi til at greiða frá verkætlanini, sum Sarah Hussain Obama, omma Barak Obama, frammanundan hevði hoyrt um.



Mynd: VestKenyas Venner

Á myndini omanfyri síggjast frá vinstru: fastur Barak Obama, Sarah Hussain Obama, ið er omma Barak Obama, og Oluf Mortensen. Myndin er tikin uttanfyri heimið hjá Sarah Hussain Obama.

Í Kenja búgva umleið 37.5 milliónir fólk, og landið er flokkað í næstniðasta flokkinum í yvirlitinum hjá OECD.

### *Liberia*

Triðja árið á rað hevur Uttanríkisráðið stuðlað ABC-barnahjálp. Í 2009 við 625.000 kr. sum skulu nýtast til arbeiðið at gera skúlan í Liberia lidnan, til innbúgv og til eftirlit av verkætlanini.

Mett verður, at tað er umráðandi, at skúlin verður liðugur, og kann fara at virka til fulnar. Uttanríkisráðið hevur frammanundan játtað 1.197 mió. kr. til verkætlanina. Skúlin er lutvíst farin í gongd, og hevur tikið inn 52 skúlabørn, sum tó framvegis ikki búgva á skúlanum.. Tørvurin er stórur, og tí ræður um at fáa skúlan lidnan. Tað er somuleiðis umráðandi hjá Uttanríkisráðnum skjótt at síggja úrslitið av tí peningi, sum ráðið hevur játtað.

Játtanin í 2009 skal nýtast til at leggja seinastu hond á fyrsta byggistig. Hetta merkir, at skúlin verður liðugur, og at innbúgv er tøkt, soleiðis at skúlin kann taka ímóti fleiri næmingum.

Talan er um fyrsta byggistig í størri verkætlan, sum umframt skúlan eisini fevnir um skúlaheim til gentur og dreingir, um matarhøll og læknastovu. ABC-barnahjálp í Íslandi letur byggja skúlaheimið og matarhøllina, meðan privat í USA hava latið fígging til læknastovuna.

Játtanin er til fyrsta byggistig, og tá hetta byggistigið er liðugt, er skúlin liðugur. ABC-barnahjálp hevur ætlanir um 2. og 3. byggistig, ið snýr seg um at byggja út, ella at byggja uppá skúlan, eins og vanligt er í flestum afrikonskum londum.

Fyrst í 2009 vitjaði Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, skúlan í Liberia. Á hesi ferðini kundi staðfestast, at arbeiðið á skúlanum er komið væl ávegis, og at leiðslan á staðnum er íðin at fáa arbeiðið liðugt.

Á ferðini hitti føroyski uttanríkisráðharrin Ellen Johnson-Sirleaf, forseti í Liberia, umframt seks aðrar ráðharrar. Eisini hitti hann fakfólk innan fiskivinnuna. Á fundunum varð greitt frá føroyska samfelagnum, og stjórnarlimirnir bjóðaðu Føroyum at vera vælkomin í landið at virka innan skúlaøkið. Fegnast varð um samstarvið, sum longu er millum Føroyar og Liberia, og bæði forsetin, fiskivinnuráðharrin og vinnumálaráðharrin hildu, at samstarvið eisini kundi víðkast til at fevna um fiskivinnuna, har stórur tørvur er á menning. Í hesum sambandi var innbjóðing latin Føroyum um at fiska í liberiskum sjógvi.

Henda innbjóðing hevur verið umrødd við umboð fyri vinnu og fiskivinnuna, og eitt av tilmælunum hagani var, at føroyingar eiga at bjóða seg fram sum altjóða fiskivinnuráðgevar í menningarlondum. Hetta tilmælið hevur Uttanríkisráðið tikið til eftirtektar og arbeitt verður við at senda út ráðgevar í 2010. (Sí eisini s.18).



Mynd: Uttanríkisráðið

Á myndini omanfyri sæst Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri saman við Ellen Johnson-Sirleaf, forseta á veg at vitja skúlan.

Uttanríkisráðið hevur fingið stutta frágreiðing frá ABC-barnahjálp um gongdina við byggingini, og fær endaliga frágreiðing, umframt grannskoðaðan roknskap, í mai 2010.

### *Sierra Leone*

Ein av nýggju umsøkjarunum, sum hava vent sær til Uttanríkisráðið, er COME, Christian on Mission Extension. COME er ikki-vinnurekandi grunnur, sum er stovnaður í juni 2009, og hevur heimstað í Kaldbak. Nevndarformaður er Pauli Nolsøe. Felagsskapurin søkti og fekk játtað 138.500 kr.

Peningurin skal nýtast til eina girðing um jarðarstykki, sum COME longu eigur, og til partvísa girðing av jarðarstykki, sum skal keypast. Harumframt er ætlanin at nýta nakað av upphæddini til at gera ein vatnbrunn.

Felagsskapurin hevur bygt eitt barnaheim, sum er til 20 børn. Foreldraleysu børnini fáa sostatt eitt heim og góðar møguleikar at ganga í skúla. Felagsskapurin eigur jørð og hevur ætlanir um at keypa meira jørð. Jørðin verður nýtt til at hava hønur og dunnur og at dyrka leyk, korn, kasava røtur osfr.  Alt til matna til tey, sum búgva á heiminum.




Mynd: COME

Tey, sum búgva á barnaheiminum, kunnu sostatt byggja upp eina tilveru, har tey fáa møguleika at læra og kunna klára seg sjálvi. Harumframt er talan um lønandi arbeiði hjá teimum, sum starvast á heiminum.

Arbeiðið at gera girðingar og vatnbrunn fór í gongd í januar 2010. Ætlanin er, at arbeiðið skal taka 4 vikur. Tað verða 17 fólk, sum fara at arbeiða á staðnum. 7 føroyingar og 10 fólk á staðnum. Eisini í hesum føri er dentur lagdur á at tryggja føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum sum heild.

Í Sierra Leone búgva umleið 6.4 milliónir krónur, og landið er flokkað í fátækasta bólkinum í yvirlitinum hjá OECD.

### ***Senegal***

Á hvørjum ári sendir WFP út áheitan um at stuðla ymiskum menningarlondum, tí tey hungra ella svølta. Í 2009 hevur Uttanríkisráðið latið 400.000 kr.

Hetta varð gjørt í kjalarvørrinum av toppfundinum hjá Heimsfelagsskapinum fyri matvøru og landbúnað, FAO. Toppfundurin var í november,  og tá varð fráboðað, at hvønn dag líður ein milliard fólk hungur, og sætta hvørt sekund doyr eitt barn av svongd.

Henda ræðsluvekjandi sannroynd fekk WFP at heita á heimssamfelagið um - alt fyri eitt - at virka fyri at basa hungri og undirføðslu í menningarlondum.

Peningurin fór til somu verkætlan í Senegal, sum stuðul er latin til tvey tey seinastu árini.

Henda verkætlan verður rópt Senegal Country Programmes. Verkætlanin fer fram í tíðarskeiðinum 2007-2011, og hon er mett samanlagt at kosta 20 mió. USD. Málið er at hjálpa 960.000 fólkum í fimm ár.

Fýra lond eru við í hesi verkætlan, umframt at fígging verður latin frá øðrum pørtum. Verkætlanin fevnir um trý ymisk átøk.

Sí upplýsingar niðanfyri: [3]

| RESOURCE SITUATION | 27 Dec 2009 |
|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| Recipient Country: | Senegal | |
| Project No.: | 104510 | DEV |
| Project Title: | Country Programme - Senegal (2007-2011) | |
| Project Duration from: | 01-Jan-07 | to: 31-Dec-11 |

| | U.S. Dollars 28,386,255 | |
|---|---|---|
| Donor | Confirmed (US$) | % of Required |
| Canada | 3,482,258 | 12.27% |
| Faroe Islands | 210,640 | 0.74% |
| Italy | 496,689 | 1.75% |
| Luxembourg | 947,957 | 3.34% |
| USA | -1,048,894 | -3.70% |
| Multilateral * | 3,829,152 | 13.49% |
| CARRYOVER AND MISCELLANEOUS INCOME | 2,023,647 | 7.13% |
| Total Received | 9,941,449 | |
| % Against Appeal | 35.0% | |
| Shortfall | 18,444,806 | |
| % Shortfall | 65.0% | |

* Multilateral allocation information is based on figures as of 15 Dec 09
This table excludes allocations from the IRA and advances through WCF.

Átøkini eru hesi:

- **Undirføðsla.** Endamálið er at fyribyrgja undirføðslu hjá børnum undir 5 ár og at fyribyrgja jod mangul, serliga í økjum har goitre er (sjúka orsakað av jod mangul). Kvinnur, sum geva bróst, og sum hava smábørn, verða eggjaðar til at luttaka í átøkum, so sum at menna børn undir 2 ár, luttaka í undirvísing í heilsu og føðslugóðum mati og at býta út vitaminir o.a. Øll, sum luttaka í átøkunum, fáa mat.

- **Undirvísing.** Endamálið er at stuðla børnum at ganga í skúla. Ætlanin hongur saman við ætlanina hjá landinum um 10-ára skúlagongd. Átakið fevnir um eina heita máltíð um dagin til børn í forskúla og barnaskúla.

[3] Operations ID: 10451.0 WFP

- **Matvørukreppa.** Endamálið er at fyribyrgja matvørukreppu og at læra at fyrisita náttúruskapta rávørutilfeingið. Familjurnar eru við í átøkum hjá kommununum og luttaka í arbeiðinum t.d. at gera vegir, brunnar, velta og læra at handfara og umsita tilfeingið. Fyri hetta arbeiðið fáa luttakararnir mat.

Senegal er flokkað í fátækasta bólkinum undir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva um 11.6 milliónir fólk.

WFP sendir ikki einstøku stuðlunum frágreiðingar um gongdina í verkætlanunum. Frágreiðingarnar verða í staðin lagdar á heimasíðuna hjá WFP. Gevarin fær eitt skrásetingarnummar, og kann á tann hátt fylgja gongdini í teim ymsu verkætlanunum. WFP byrjaði í 1996 at gera almennar frágreiðingar á henda hátt, og í dag nýta allir stovnar undir ST sama frágreiðingarhátt. WFP ger somuleiðis yvirlit yvir gevaralond. Sí fylgiskjal á síðu 25.

### *Tansania*

Uttanríkisráðið hevur í 2009 játtað 70.000 kr., til skúlaútbúna til felagsskapin Mkuza Youth Development Association, stytt MYODA. Hetta er triðja árið, at stuðul verður latin til henda felagsskapin. Í ár varð søkt um at fáa brúkta skúlaútgerð sum borð, stólar, kopimaskinu o.a. Í samráð við ráðgevandi nevndina, varð gjørt av at royna at stuðla á henda hátt og at keypa útbúnaðin frá Dugna. Hetta var m.a. grundað á, at endurnýtsluhandilin hjá Dugna selur júst tílíka skúlaútgerð, og at peningurin, sum tey vinna, harumframt fer til eitt gott endamál.

At senda bingjur við nyttuvørum til menningarlond er vanliga brúkt sum ein av fleiri háttum at arbeiða innan menningarsamstarv og mett varð, at tað var vert at royna henda arbeiðshátt. Søkt var eftir samskipara at fáa í lag tey praktisku viðurskiftini í hesum sambandi. Seks umsóknir komu, og avrátt varð at seta Sigurd Lamhauge at loysa uppgávuna.

Tað vísti seg, at skúlaútbúnaðurin, ið kundi fáast til vega, trongdi til ábøtur, og tí setti samskiparin seg í samband við umboð frá Tekniska skúla, sum vóru fegin um, at næmingarnir kundu seta borð og stólar í stand. Harumframt hevur samskiparin fingið og keypt aðra útgerð sum kopimaskinu, uppvørpu, glarir, pennar o.a.



Mynd: Uttanríkisráðið

Á myndini omanfyri síggjast næmingar á timburdeildini hjá Tekniska Skúla í Havn, í fer við at snøgga skúlaborð, sum skal til Tansania.

Í Tansania búgva 37 milliónir fólk og landið er flokkað í fátækasta bólkinum eftir flokkingini hjá OECD.



Mynd: Uttanríkisráðið

Á myndini omanfyri sæst Sigurð Lamhauge á keiuni í Kollafirði, áðrenn bingjan fór við Samskip til Dar es Salam.

Til tess at tryggja at bingjan kemur á rætta stað, og útbúnaðurin kemur til høldar, fer Sigurd Lamhauge á staðið at taka ímóti og seta upp útgerðina. Eisini verður eftirmetingarfrágreiðing latin Uttanríkisráðnum um hesa royndarverkætlan.

MYODA hevur latið roknskap inn fyri fyrstu játtanina, og latið Uttanríkisráðnum frágreiðing um gongdina í skúlanum í mai og roknskap í desember 2009.

***Annað***

Í sambandi við stuðulskonsert í Norðurlandahúsinum, sum var til frama fyri skúlabørn í Gana og í Liberia, lat Uttanríkisráðið 10.000 kr. Tað vóru hjálparfelagsskapirnir ABC-barnahjálp og CRUDEC, sum stóðu fyri innsavningini. Uttanríkisráðið hevur stuðlað báðum felagsskapum frammanundan.

European Fisheries Development Advisors er eitt forum, har fólk, sum starvast innan fiskivinnu í menningarlondum árliga hittast. Í ár var fundurin í Norra. Á fundinum fekst samstarv í lag við embætisfólk, sum arbeiða hjá Norwegian Agency for Development Coorporation, (NORAD) um, at føroyingar kunnu fáa møguleika at taka á seg styttri arbeiðsuppgávur, og á henda hátt fáa royndir og vitan um eftirmeting av fiskivinnuverkætlanum í menningarlondum. Upplýst varð, at teimum ofta tørvar starvsfólk at gera tílíkar uppgávur, sum kunnu taka millum eina til tríggjar vikur. Havstovan og Heilsufrøðiliga Starvsstovan eru kunnað um hesa skipan, og samband er fingið í lagið millum áhuga á Havstovuni og NORAD.

Føroyingar, serliga ung lesandi, hava eisini møguleika at førleikamenna seg innan altjóða viðurskifti. Í mai mánaði fekk Uttanríkisráðið avtalu í lag við Mercy Corps um, at Fróðskaparsetur Føroya kundi upplýsa teim lesandi um, at tey hava møguleika at søkja sum sjálvboðin at starvast hjá Mercy Corps, sum hevur høvuðssæti í Edinburgh.

Harumframt stendur tað eisini Fróðskaparsetrinum í boði at gera serliga avtalu við høvuðsskrivstovuna um, at lesandi kunnu koma í starvsvenjing. Uppgávurnar snúgva seg m.a. um at skriva umsóknir til myndugleikar um fíggjarligan stuðul til verkætlanir, og at gera eftirmetingar av verkætlanum, ymsa staðni í heiminum. Treytin er, at tann lesandi hevur førleika í enskum máli og hevur útbúgving á bachelorstigi.

Umboð frá sendistovuni í Keypmannahavn hevur luttikið á eftirmetingarfundi í danska Uttanríkisráðnum, har kunnað varð um, hvønn týdning eftirmetingarfrágreiðingar av manningarsamstarvi hava, og hvussu tær skulu gerast.

Harumframt hevur Uttanríkisráðið fráboðað í avtaluskjalinum, sokallaðu Grant Agreement, sum verður gjørd millum Uttanríkisráðið og stuðulsmóttakarar, at ráðið skilar sær rætt, ófráboðað, at møta upp á staðnum og gera eftirkanningar av teim verkætlanum, sum ráðið hevur stuðlað.

## Neyðhjálp lond

### *Filippsoyggjar*

Ódnin Ketsana rakti Filippsoyggjar tann 26. september 2009. Ódnin hevði við sær vatnflóð og nógva oyðilegging í høvuðsstaðnum Manilla. Myndugleikarnir á staðnum boðaðu frá, mánadagin 28. september, at ódnin tá hevði kravt 240 mannalív. Ein hálv millión fólk flýddu frá húsi og heimi, og um 380.000 høvdu fingið fyribilsskjól. Seinni eru hesi tøl hækkað.

Myndugleikarnir heittu á altjóða samfelagið um hjálp, tí tørvur var á reinum vatni, klæðum, mati og teltum.

Uttanríkisráðið vendi sær til Reyða Kross at vita, um tey kundu fáa hjálp á staðið. Tey boðaðu frá, at tørvur var á at fylla upp goymslurnar hjá Reyða Krossi á Filippsoyggjum, at goymslurnar vóru spjaddar, og tí var trupult at samskipa, og at stórur tørvur var á útgerð.

Uttanríkisráðið gjørdi tí av at lata ein triðing av játtanini, sum er 100.000 kr., til hetta endamál.




Mynd: Joel Katz

### *Samoa*

Ein flóðalda, ella sokallað tsunami, rakti Samoa 29. september 2009. 170 fólk lótu lív og nógv hundrað fólk mistu hús og heim, umframt grundarlagið at breyðføða seg og síni.

Uttanríkisráðið fekk, gjøgnum felagsskapin Mercy Corps, samband við sjálvbodna hjálparfelagsskapin South Pacific Business Development, SPBD, hvørs uppgáva í stóran mun er at byggja uppaftur Samoa. Hetta verður gjørt við ymiskum átøkum.

Eitt av átøkunum er at byggja uppaftur arbeiðsplássini, sum vóru skolaði burtur ella oyðiløgd, tá ið flóðaldan rakti landið. Eisini skulu hús byggjast til teirra, sum mistu síni heim. Uttanríkisráðið gjørdi av at lata 200.000 kr. til hetta endamál. Peningurin verður

latin sum lán, ið ikki skal rindast aftur. Lánini verða einans latin teimum, sum mistu sítt lívsgrundarlag.

Samoa hevur verið fullveldi síðan 1962, eftir at hava verið undir týskum harradømi og undir Ný Sælandi. Samoa liggur í Stillahavnium og har búgva um 190.000 fólk. Sí kortið niðanfyri.



Mynd: Mirror.co.uk




Mynd: News.bbc.co.uk

## Virksemi nevndarinnar

Eins og ásett í lógini, skal ráðgevandi nevndin veita myndugleikanum ráð at fremja lóg um altjóða menningarsamstarv í verki. Hesin setningur verður framdur soleiðis, at allar umsóknir, ið fyrisitingin metir, lúka treytirnar í lóggávuni, verða lagdar fyri nevndina at umrøða. Harumframt umrøður nevndin eisini onnur mál og átøk, sum eru viðkomandi fyri at fremja lóggávuna í verki, nevnast kann t.d. roknskapur, eftirlitsvitjanir og eftirmetingar.

Í 2009 hevði nevndin seks fundir, íroknað evnisdag, har ymiskir spurningar um føroyskan menningarpolitikk vórðu viðgjørdir. Eitt nú varð viðgjørt, hvørt Føroyar eiga at avmarkað seg til ávís lond ella ávísir heimspartar, og um Føroyar eiga at stuðla ávísum verkevnum, sum t.d. útbúgving og heilsu. Harumframt var umrøtt, í hvønn mun verkætlanir eiga at verða stuðlaðar saman við øðrum gevarum, ella um dentur skal leggjast á, at luttaka í smáum verkætlanum.

Spurningarnir um býtið millum stjórnarfelagsskapir og sjálvbodnar hjálparfelagsskapir og um føroyska luttøku í menningarsamstarvi, bæði við vitan og við arbeiðsorku, vórðu eisini viðgjørdir.

Júst somu spurningar vóru umrøddir í 2008, og niðurstøðan var, at Uttanríkisráðið eigur at raðfesta heilsu og útbúgving umframt aðrar verkætlanir, t.d. innan fiskivinnuna. Harumframt eigur dentur at verða lagdur á, at allar umsóknir skulu síggjast við atliti til føroyska luttøku. Endamálið við tí er at byggja upp ein førleika at samstarva í altjóða umhvørvi og á henda hátt fáa vitan og netverk.

Í nevndini eru Marita Rasmussen, forkvinna, stjóri í Vinnuhúsinum, Snorri Brend, næstformaður, blaðmaður, Lars Thostrup, stjóri í Norrønum Atlantssamstarvi, Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur og Óluva Niclasen, deildarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

## Samstarvspartar

***ABC-barnahjálp í Føroyum***

ABC barnahjálp í Føroyum er sjálvsognarstovnur við heimstaði og høvuðssæti í Tórshavn. ABC barnahjálp varð stovnað í 2007. Felagsskapurin hevur sín uppruna í Íslandi, har virksemið byrjaði í 1988. ABC barnahjálp í Føroyum samstarvar við og eftir somu meginreglum sum ABC Children´s International. Høvuðsendamálið er at útvega fátækum børnum í menningarlondum varandi hjálp við skúla, útbúgving og læknahjálp.

***ADRA (Adventist Development and Relief Agency)***

Adventistakirkjan byrjaði at arbeiða við neyðhjálp stutt eftir fyrsta heimsbardaga og setti á stovn SAWS (Seventh Day Adventist World Service). Felagsskapurin hevur gjøgnum tíðina ment seg, og virkar í dag sum sjálvstøðugur felagsskapur - skilt frá Adventistakirkjuni. Endamálið hjá ADRA er at arbeiða við menningar- og neyðhjálp til tess at stuðla menniskjum í neyð, óansæð huðalit, kyn, og tilknýti til politikk ella religión.

***Care for Rural Deprived Children (CRUDEC)***

CRUDEC er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum varð settur á stovn í 2004. Felagsskapurin er skrásettur hjá myndugleikunum, og dagligur leiðari er Charlotte Ahenkang. Høvuðsendamálið hjá felagsskapinum er at betra um umstøðurnar hjá børnum, sum vaksa upp undir fátøkum korum og sostatt hava skerdar menningarmøguleikar.

***Christian on Mission Extension (COME)***

COME er ein ikki-vinnurekandi grunnur, sum er stovnaður í juni 2009 og hevur heimstað í Kaldbak. Nevndarformaður er Pauli Nolsøe. Endamálið er at hjálpa teimum, ið hava ov tungar byrðar at bera.

***Mercy Corps***

Mercy Corps er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, ið varð settur á stovn í 1982. Fyrsta menningarverkætlanin var í Honduras sama ár. Høvuðsendamálið er at berja niður líðing, fátækaradømi og trælkan við at byggja upp trygg, framleiðandi og rættvís samfeløg. Mercy Corps arbeiðir víða í heiminum og hevur høvuðssæti í USA.

***Mkuza Youth Development Association (MYODA)***

MYODA, er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum formliga varð settur á stovn í 2005, tó at hann hevur virkað síðan 2003. Felagsskapurin virkar í Tansania, og høvuðsendamálið er at menna ungdómin, minka um fátækaradømi og at basa HIV og Aids.

***Reyði Krossur***

Reyði Krossur Føroya varð stovnaður í 1926. Staðfest varð, at tørvur var á, at sjálvboðin kundu veita veikum í hesum samfelagnum hjálp og kunning. Gjøgnum Dansk Røde Kors,

eru Føroyar limur í tí størsta heimsumfatandi hjálparfelagsskapinum, og eru sostatt við til at kunna veita og fáa hjálp. Reyði Krossur hevur um 137 milliónir limir.

### *Vestkenyas Venner*

Vestkenyas Venner er skipað sum hjálparfelagsskapur, hvørs endmál er, saman við íbúgvunum á staðnum, at stuðla menningarverkætlanum í vestara partinum í Kenja. VestKenyas Venner varð sett á stovn í 2007.

### *World Food Programme (WFP)*

WFP er sjálvstøðugur stovnur undir Sameindu Tjóðum. WFP varð sett á stovn í 1963. Endamálið er at basa hungri og hungursneyð, at betra um føðslu og dygd í mati hjá teim allar fátækastu fólkunum, og at tryggja burðardygga menning á staðnum.

# Listi yvir menningarlond

**DAC List of ODA Recipients**

**Effective for reporting on 2008, 2009 and 2010 flows**

| Least Developed Countries | Other Low Income Countries (per capita GNI < $935 in 2007) | Lower Middle Income Countries and Territories (per capita GNI $936-$3 705 in 2007) | Upper Middle Income Countries and Territories (per capita GNI $3 706-$11 455 in 2007) |
|---|---|---|---|
| Afghanistan | Côte d'Ivoire | Albania | *Anguilla |
| Angola | Ghana | Algeria | Antigua and Barbuda[1] |
| Bangladesh | Kenya | Armenia | Argentina |
| Benin | Korea, Dem. Rep. | Azerbaijan | Barbados[2] |
| Bhutan | Kyrgyz Rep. | Bolivia | Belarus |
| Burkina Faso | Nigeria | Bosnia and Herzegovina | Belize |
| Burundi | Pakistan | Cameroon | Botswana |
| Cambodia | Papua New Guinea | Cape Verde | Brazil |
| Central African Rep. | Tajikistan | China | Chile |
| Chad | Uzbekistan | Colombia | Cook Islands |
| Comoros | Viet Nam | Congo, Rep. | Costa Rica |
| Congo, Dem. Rep. | Zimbabwe | Dominican Republic | Croatia |
| Djibouti | | Ecuador | Cuba |
| Equatorial Guinea | | Egypt | Dominica |
| Eritrea | | El Salvador | Fiji |
| Ethiopia | | Georgia | Gabon |
| Gambia | | Guatemala | Grenada |
| Guinea | | Guyana | Jamaica |
| Guinea-Bissau | | Honduras | Kazakhstan |
| Haiti | | India | Lebanon |
| Kiribati | | Indonesia | Libya |
| Laos | | Iran | Malaysia |
| Lesotho | | Iraq | Mauritius |
| Liberia | | Jordan | *Mayotte |
| Madagascar | | Macedonia, Former Yugoslav Republic of | Mexico |
| Malawi | | Marshall Islands | Montenegro |
| Maldives | | Micronesia, Federated States | *Montserrat |
| Mali | | Moldova | Nauru |
| Mauritania | | Mongolia | Oman[1] |
| Mozambique | | Morocco | Palau |
| Myanmar | | Namibia | Panama |
| Nepal | | Nicaragua | Serbia[3] |
| Niger | | Niue | Seychelles |
| Rwanda | | Palestinian Administered Areas | South Africa |
| Samoa | | Paraguay | *St. Helena |
| São Tomé and Príncipe | | Peru | St. Kitts-Nevis |
| Senegal | | Philippines | St. Lucia |
| Sierra Leone | | Sri Lanka | St. Vincent and Grenadines |
| Solomon Islands | | Swaziland | Suriname |
| Somalia | | Syria | Trinidad and Tobago[2] |
| Sudan | | Thailand | Turkey |
| Tanzania | | *Tokelau | Uruguay |
| Timor-Leste | | Tonga | Venezuela |
| Togo | | Tunisia | |
| Tuvalu | | Turkmenistan | |
| Uganda | | Ukraine | |
| Vanuatu | | *Wallis and Futuna | |
| Yemen | | | |
| Zambia | | | |

*Territory.

(1) Antigua & Barbuda and Oman exceeded the high income country threshold in 2007. In accordance with the DAC rules for revision of this List, both will graduate from the List in 2011 if they remain high income countries until 2010.

(2) Barbados and Trinidad & Tobago exceeded the high income country threshold in 2006 and 2007. In accordance with the DAC rules for revision of this List, both will graduate from the List in 2011 if they remain high income countries until 2010.

(3) At present aid to Kosovo is recorded under aid to Serbia. Kosovo will be listed separately if and when it is recognised by the UN.

As of April 2008, the **Heavily Indebted Poor Countries (HIPCs)** are : Afghanistan, Benin, Bolivia, Burkina Faso, Burundi, Cameroon, Central African Republic, Chad, Comoros, Congo (Dem. Rep.), Congo (Rep.), Côte d'Ivoire, Eritrea, Ethiopia, Gambia, Ghana, Guinea, Guinea-Bissau, Guyana, Haiti, Honduras, Kyrgyz Republic, Liberia, Madagascar, Malawi, Mali, Mauritania, Mozambique, Nepal, Nicaragua, Niger, Rwanda, São Tomé and Príncipe, Senegal, Sierra Leone, Somalia, Sudan, Tanzania, Togo, Uganda and Zambia.

# Fíggjarnýtsla

**Menningarsamstarv 2009**

| | |
|---|---|
| **Játtan 2009** | **3.000.000 kr.** |

**<u>Verkætlanir</u>**

| | |
|---|---|
| **Stuðul** | |
| ABC-barnahjálp, Liberia | 625.000 kr. |
| ADRA, Burundi | 649.908 kr. |
| COME, Sierra Leone | 138.500 kr. |
| Mercy Corps, Indonesia | 540.000 kr. |
| Mkuza Youth Development Association, Tansania | 69.541 kr. |
| Reyði Krossur, Kambodia | 517.000 kr. |
| Vestkenyas Venner, Kenja | 31.150 kr. |
| World Food Programme, Senegal | 400.000 kr. |
| Annað | 19.616 kr. |
| | **2.990.715 kr.** |

**Neyðhjálp 2009**

| | |
|---|---|
| **Játtan 2009** | **300.000 kr.** |

**<u>Verkætlanir</u>**

| | |
|---|---|
| Reyði Krossur, Ódn Katsana Filippsoyggjar | 150.000 kr. |
| SPBD, Flóðalda, Samoa | 150.000 kr. |
| | **300.000 kr.** |

# Contributions to WFP in 2009 (in US$) as of 17 January 2010

| | | |
|---|---|---|
| 1 | USA | 1,757,330,334 |
| 2 | European Commission | 343,829,521 |
| 3 | Canada | 225,343,299 |
| 4 | Spain | 213,851,823 |
| 5 | UN CERF Common Funds and Agencies | 204,864,281 |
| 6 | Japan | 202,684,092 |
| 7 | Germany | 132,068,645 |
| 8 | United Kingdom | 127,624,011 |
| 9 | Private Donors | 104,412,111 |
| 10 | Australia | 81,395,001 |
| 11 | Netherlands | 77,593,799 |
| 12 | Sweden | 72,487,335 |
| 13 | Denmark | 41,885,080 |
| 14 | Norway | 40,409,778 |
| 15 | Belgium | 39,111,032 |
| 16 | Switzerland | 39,089,306 |
| 17 | Italy | 29,999,511 |
| 18 | Pakistan | 28,993,943 |
| 19 | Finland | 28,523,710 |
| 20 | Russian Federation | 26,800,000 |
| 21 | Saudi Arabia | 23,340,830 |
| 22 | Ireland | 22,549,123 |
| 23 | France | 19,804,093 |
| 24 | India | 17,098,111 |
| 25 | Brazil | 15,761,239 |
| 26 | Kenya | 14,576,936 |
| 27 | Luxembourg | 13,625,002 |
| 28 | Qatar | 10,216,501 |
| 29 | Greece | 6,027,881 |
| 30 | Republic of Korea | 5,400,000 |
| 31 | Bangladesh | 5,194,019 |
| 32 | Burundi | 4,878,049 |
| 33 | Cambodia | 4,371,008 |
| 34 | Egypt | 4,174,936 |
| 35 | New Zealand | 3,734,732 |
| 36 | China | 3,058,868 |
| 37 | Turkey | 2,432,087 |
| 38 | Malawi | 1,956,654 |
| 39 | Madagascar | 1,919,430 |
| 40 | Austria | 1,721,903 |

| | | |
|---|---|---|
| 41 | Cuba | 1,199,400 |
| 42 | Indonesia | 1,000,000 |
| 43 | Cyprus | 814,201 |
| 44 | Jordan | 706,000 |
| 45 | South Africa | 672,207 |
| 46 | World Bank | 652,972 |
| 47 | Ukraine | 580,000 |
| 48 | Poland | 534,747 |
| 49 | Liechtenstein | 333,364 |
| 50 | Republic of Congo | 329,027 |
| 51 | Czech Republic | 309,043 |
| 52 | Burkina Faso | 250,398 |
| 53 | Ecuador | 247,780 |
| 54 | Bolivia | 211,495 |
| 55 | Guatemala | 171,603 |
| 56 | Iceland | 150,000 |
| 57 | Faroe Islands | 131,588 |
| 58 | Guinea, The Republic Of | 118,296 |
| 59 | Portugal | 111,928 |
| 60 | Slovenia | 108,140 |
| 61 | Philippines | 102,098 |
| 62 | Oman | 100,000 |
| 63 | Thailand | 96,653 |
| 64 | Romania | 75,301 |
| 65 | Panama | 68,000 |
| 66 | Syria | 66,684 |
| 67 | Hungary | 65,000 |
| 68 | Croatia | 64,000 |
| 69 | Chile | 50,000 |
| 70 | Mexico | 50,000 |
| 71 | Kazakhstan | 40,000 |
| 72 | Andorra | 39,681 |
| 73 | Singapore | 30,000 |
| 74 | Israel | 30,000 |
| 75 | Nicaragua | 24,000 |
| 76 | Colombia | 20,010 |
| 77 | Bhutan | 5,179 |
| 78 | Argentina | 2,949 |
| 79 | African Dev Bank | 904 |
| Total | | 4,009,700,662 |

* Allocations to WFP from common funding mechanisms. Note: Contribution data may be subject to change as a result of retroactive adjustments

# Lóg um altjóða menningarsamstarv

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1. Henda lóg skal leggja lunnar undir føroyska luttøku í altjóða samfelagnum at minka um búskaparliga ójavnan í heimi.
Stk. 2. Landsstýrið skal virka fyri hesum við at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi til frama fyri menningarlond, smbr. stk. 3. Samstarvið kann vera formligt sum óformligt.
Stk. 3. Í hesi lóg verða menningarlond skilmarkað á sama hátt sum hjá OECD.

§ 2. Landsstýrið kann hava menningarsamstarv við stjórnir í menningarlondum, stjórnir í øðrum londum, altjóða stjórnarfelagsskapir og aðrar felagsskapir, teirra millum føroyskar.
Stk. 2. Samstarvið kann fevna um fakliga ráðgeving og fíggjarligan stuðul til lutvísa fígging av verkætlanum í menningarlandi, har ætlanin er:
1) at skipa haldgóða fyrisiting,
2) at fáa búskaparvøkstur og
3) at tryggja sosial framstig
Stk. 3. Tá ið til ber, eiga føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki at verða gagnnýtt og ment í sambandi við slíkar verkætlanir.

§ 3. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari treytir og reglur fyri, hvør kann fáa stuðul, og nær og hvussu stuðul verður játtaður. Her eru at nevna krøv til fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og afturrindan av stuðli.

§ 4. Nevnd fyri menningarsamstarv skal geva landsstýrismanninum ráð til at fremja hesa lóg í verki.
Stk. 2. Nevndin hevur formann og fýra limir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir at sita í fýra ára skeið.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ger fyriskipan fyri virksemi nevndarinnar.

§ 5. Henda løgtingslóg fær gildi 30. juli 2007